Jólatilboð

Baðirúmstilhoyri

Rondo -32,5% & Concorde -35%

Svend Krosstein
Falkavegur · tlf. 31 46 00
VHS
Ar tilsetningar VATN HITAVERK SANITET

Skrivstova felagsins er stongd frá fríggjadegnum 21. desember kl. 12.00 til hósdagin 3. januar 2002.

Somuleiðis ynskir Føroya Arbeiðarafelag limum sínum við familju og øllum viðskiftafólki eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári, við tøkk fyri skjótt farna ár.

Føroya Arbeiðarafelag

Leiðari til útibarnagarð

Í samband við at Leirvíkar Kommuna er í ferð við at seta útibarnagarð á stovn, verður søkt eftir leiðara at byrja 1. februar 2002.

Vit søkja ein persón, ið dámar væl at verða úti í náttúruni, hevur eitt opið sinni og sær møguleikar fram um mørk.

Umsøkjarar við pedagogútbúgving hava fyrimun. Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 7. januar 2002 kl. 12.00**.

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42
520 Leirvík

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3278
Navn: Sp/f Diana
Adressa: 627 Lambi
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 01.12.2001
Viðtøkudato: 01.12.2001
Kapitalur: Kr. 200.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 200.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Oddvør Petersen, 640 Rituvík, Diana Jacobsen, 627 Lambi, Jórun Jacobsen, 665 Skipanes og Emma Hansen, 645 Æðuvík.
Nevnd: Emma Hansen, 645 Æðuvík (formaður), Oddvør Petersen, 640 Rituvík, Diana Jacobsen, 627 Lambi og Jórun Jacobsen, 665 Skipanes.
Stjórn: Diana Jacobsen, 627 Lambi.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella av tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. desember 2001

Kristin Balle

zarepta

Um Gud vil verður Bíbliugransking í Zarepta á nýggjárinum

Evnir:
Galatiabrævið
Filippibrævið
Estersbók
Krossurin
Dávid

Tíð:
Skeiðið byrjar hósk vøldið 27.12.2001 og endar týsdagin 1.1.2002

Aldursmark: 17 ár og eldri.

Tilmelding:
Áhugað verða biðin um at tekna seg í góðari tíð á tlf. 312370 - 316519 - 315062



Hósdagin 27/12-01 hevur stovnurin avgreiðslu frá kl. 13.00-16.00 og fríggjadagin 28/12-01 er avgreiðsla frá kl. 13.00-15.30.

Stuðulsstovnurin
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
E-mail: studul@studul.fo

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -tað loysir seg

Sosialurin i Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Stongt verður millum jól og nýggjár.

Matrikulstovan
J. Broncksgøta 22, boks 327, FO-110 Tórshavn
Telef. 314533 - telefax 310408
www.matrikul.fo · post@matrikul.fo
Avgreiðslutíð: kl. 10.00–12.00 / 13.00–15.00

Seinasta freist at lata lýsingar inn til leygardagsblaðið 22/12 er hósdagin 20. desember kl.15.00
Freistin at bíleggja litlýsingar ella lýsingar, sum eyka-arbeiði stendst av, er kl. 14.00

Sosialurin

KVØLDSKRÁ

Á HANDILSSKÚLANUM Á KAMBSDALI

Innskrivingarseðil, várhálvan 2002

Navn:	
Føðingardagur:	
Gøta:	
Postnr./bygd:	
Starv/arbeiðsplass:	
Tel. heima:	Tel arb.:
Teldupost adr.:	

Merkonom:

Arbeiðsrættur*	Mánad.	18.00-20.30	☐
Virkisfyriskipan*	Týsd.	18.00-20.30	☐
Innkeyp*	Týsd.	18.00-20.30	☐
Altjóða vinnulívsrættur*	Mikud.	18.00-20.30	☐

Onnur ynskir um lærugreinar: _____

* 45 tíma lærugrein. Prógvtøka í mai 2002

Serligar fortreytir:

Arbeiðsrættur:	ongin
Virkisfyrskipan:	ongin
Altjóða vinnlívsrættur:	ongin
Innkeyp:	ongin, - tó fortreyt fyri at kunna taka merkonomlærugreinina Logistik, sum væntandi verður boðin út á heysti 2002

Kostnaður:

Depositum:	250,00 kr. fyri hvønn luttakara
Merkonom, luttøkugjald:	400,00 kr. fyri 45 tíma lærugrein

_____
Dagur, undirskrift

Ivast tú, ring og spyr eftir lestrarvegleiðara. Fleiri upplýsingar um merkonomútbúgvingina eru at finna undir útbúgvingar á www.hsh.fo.

Innskrivingarfreistin til kvøldskúlan er **9. januar 2002.** Skúlagongdin byrjar í viku 3. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum. Øll undirvísing er treytað av nóg góðari undirtøku.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Kambsdalur - 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 - Fax 444 901 - Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

Hotel Runavík Sjómansheimið

Vit hava stongt millum jól og nýggjár.

Stongt verður 23. des. 2001, og latið verður upp aftur sum vanligt 2. jan. 2002.

Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólki eini gleðilig jól, og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

Søkt verður eftir

Hjálparfólki

Vøggustovan við Velbastaðvegin søkir eftir einum hjálparfólki 25 tímar um vikuna, at byrja 15. januar 2002 ella eftir nærri avtalu. Starvið er tíðaravmarkað til 31. juli 2002.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 41 vøggustovubørn. Tríggjar stovur hava 10 børn hvør og ein stova hevur 11 børn.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fríggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Inga-Mariu Amandusardóttir ella varaleiðaran Elisabeth Hendriksen.

Vøggustovan við Velbastaðvegin
Velbastaðvegur 39
100 Tórshavn
Tlf. 314379 · Fax 321179

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

Laboratoriið

á Landssjúkrahúsinum er stongt frá **21. des. til 2. januar 2002**.

Landssjúkrahúsið

STARV sosialurin

Sosialinum tørvar blaðfólk

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi, og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur, so er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Okkum tørvar blaðfólk, og vit bjóða eitt hendingaríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Seinastu tíðina hava vit økt um virksemi við at skriva tíðindi til www.portal.fo. Hetta hevur eisini fært til økt krøv til redaktiónina, men er eisini við til at menna tíðindaflutningin, sum støðugt verður dagførdur á internetinum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna, umframt støðugu tíðindi á internetinum.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 8. januar 2002. Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. (GG: Hetta er sama starv, sum varð lýst leyst síðstu viku í november. Eftir áheitan er freistin longd)

Arbeiðsfólk

Til viðarlundina í Trongisvági verður søkt eftir fólki at arbeiða umleið 600 tímar árliga. Arbeiðið verður í samráð við Skógrøkt Landsins.

Umsóknir skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi tórsdagin 27/12-2001.

Tvøroyrar kommuna

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir